# Landsfyrisitingin hevur brúk fyri málsligari vegleiðing

**Óli Breckmann og John Johannesen funnust av Tingsins røðarapalli at manglandi málsliga førleikanum hjá landsfyrisitingini og mæltu til, at fyristingin setir fólk í starv, at hjálpa við at orða viðmerkingar til lógaruppskot**

TINGMÁL
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Óli Breckmann heitir á fyrisitingina um at leita sær málsliga hjálp*

Óli Breckmann saknar greiðari orðingar í viðmerkingum til lógaruppskot, ið koma á tingsins borð. Hann skeyt upp, at fyrisetingin setti eitt blaðfólk ella onkran tílíkan, ið dugir at skriva á greiðum føroyskum máli, hvat málini snúgva seg um.

### Fløkjaslig orðing

Beinleiðis orsøkin til viðmerkingarnar hjá Óla Breckmann, var ein orðing í viðmerkingunum til uppskotið um endurgjald fyri Oljudálking, ið varð viðgjørt í dag. Tað var orðingin: ”Hesir sáttmálar gera tað møguligt at rinda endurgjald í sambandi við oljudálkingar”. Henda orðing tykist at siga, at her er talan um eitt endurgjald, ið føroyingar skuldu gjalda til onnur lond, meðan talan í veruleikanum er, at føroyingar kunnu fáa endurgjald uttan í frá.

Óli Breckmann vísti á, at tá tú lesur allar viðmerkingarnar til málið, so skilur tú, hvat málið snýr seg um. Men hann helt, at tað átti at verið møguligt, at skriva á einum so greiðum máli, at tú beinanvegin varð greiður um, hvat hetta snýr seg um.

### Eitt uppfunnið mál

John Johannesen, tingmaður fyri Javnaðarflokkin gav Óla Breckmann rætt í sínum atfinningum og fanst sera hvassliga at fyrisitingini. Hann segði, at málbrúkið í lógaruppskotum, sum koma frá fyrisitingini, gerst løgnari og løgnari og torskildari og torskildari. Hann vísti á, at hetta er sera álvarsamt. Tí tað er alneyðugt, at vanligi borgarin skilur landsins lógir. Málið, ið fyrisitingin brúkar, er sambært John Johannesen eitt uppfunnið mál hjá fyrisitingini, hetta er hvørkið føroyskt ella útlendskt. Hann tók tí undir við Óla Breckmann, ið helt, at fyrisitingin átti at fingið sær fólk, ið kundu lagt lag á málsliga.

Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, helt harafturímóti, at talan var um greiðar orðingar, og heitti á tingmenn um at fyrireika seg betur, hann segði millum annað, at viðmerkingarnar hjá Óla Breckmann og John Johannesen vóru nakað tvætl.

Bjørn Kalsø, landstýrismaður segði, at hann tók atfinningarnar á seg, og vildi ikki afturvísa, at onkrar av orðingunum vóru heldur torskildar.

# Gospelkonsertir við Hans Jørn Østerby

KONSERT
*tíðindaskriv*

Frelsunarherurin í Vági skipar um páskini fyri trimum konsertum við kenda danska vísusangaranum Hans Jørn Østerby. Hans Jørn er føddur í Tommerup á Fjóni í 1963. Hann vaks upp og býr í Skjern í vestur Jútlandi, er giftur og hevur fýra børn. Í nógv ár spældi hann við bólkinum Josua, sum í 1990 gav út fløguna ”En verden til forskel”. Hendan útgáva, sum gjørdist ein av mest seldu útgávunum á kristna fløgumarknaðinum í Danmark, gjørdist ein slóðbrótari fyri danskan kristnan rokk. Síðani tá hevur Hans Jørn mest spælt solo og tað er blivið til 7 fløguútgávur.

Hann er nógv eftirspurdur, tí árliga verður tað til uml. 100 framførslur á festivalum, í útvarpi, sjónvarpi o.a. bæði í Danmark og uttanlanda.

Hann var fyrstu ferð í Føroyum fyri tveimum árum síðani.

Konsertirnar í Føroyum á hesum sinni verða:
Í Mentunarhúsinum í Fuglafirði fríggjadagin 7. apríl kl. 19.30,
í Norðurlandahúsinum leygardagin 8. apríl kl. 19.30
og á Gistingarhúsinum í Øravík mikudagin 12. apríl kl. 19.30.

Atgongumerki til konsertirnar fáast á kunningarstovunum.

HarraSalong
á Glyvrum
Eg byrji aftur at arbeiða
hósdagin 23. mars



• Smádreingir - stutt og smart
• Teir ungu - mótaklipp við farvu
• Tilkomnir og eldri menn - so sum tit altíð plaga

Ring og avtala tíð
á tel 44 7888 - 28 7888

Hárprýði

Hárprýði v/Byrgerð Kjærbæk
Dalavegur 5, Glyvrar
Tel 44 7888, Fartel 28 7888

Íslendski búskapurin:

# Bara spurningur um tíð

**Í eini óvanliga atfinningarsamari greining sigur størsti bankin í Danmark, den Danske Bank, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn íslendski búskapurin rapar**

ÍSLAND
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hækkandi lønir. Ein inflatiónsrata á 4%. Ekstremt lágt arbeiðsloyvi. Og ein tjóðbankarenta, sum júst er skrúvað heilt upp á 10%.

Hetta eru nøkur av heilt greiðu vandatekinunum, sum eru at síggja í íslendska búskapinum. Í farnu viku sendi danska Nykredit út beinleiðis ávaring um íslendsku støðuna, og nú gongur Danske bank í sama spori.

– Lítli íslendski búskapurin er ein tann mest yvirhitaði í Europa. Niðurtúrurin lúrir beint handan hornið, og talan verður um eina harða uppbremsan. Ein uppbremsan, sum kann helst fer at geva ein negativan vøkstur á 10% um árið komandi tvey árini, verður millum annað sagt í greiningini.

### Trýst á partabrøvini

Seinnu árini hevur talan annars verið um búskaparligan metvøkstur í Íslandi. Partabrævamarknaðurin er mest sum eksploderaður, og íslendsku stóríleggjararnir, Baugur og Burderas, hava framt risa-uppkeyp uttanlands. Millum annað við at keypa Magasin, Maersk Air, Sterling Airways og ætlandi eisini Marks & Spencer.

Sambært donskum serfrøðingum, so kann tó roknast við, at virðið á hesum fyritøkum nú verður trýst niðureftir.

– Ójavnvágin í búskapin er so stór, at ein afturgongd fer at koma heilt skjótt. Fíggjarmarknaðurin verður raktur við høgari inflatión, einum veikum íslendskum gjaldoyra og einum sera stórum trýsti á partabrævamarknaðin, sigur senioranalytikarin, Lars Christiensen, hjá Den Danske Bank.

Trýstið á partabrøvini er væntandi, tí mett verður, at stóru íleggjararnir verða noyddir at fáa kontantan pening, tá lán skulu afturrindast, og tí verður talan um eitt lutfalsliga stórt útboð av partabrøvum.

Hetta kann eisini raka føroysk virki, sum eru skrásett á ICEX, og fyrstu rembingarnar hava longu verið at sæð. Føroyska Atlantic Petroleum hevur seinastu tvær vikurnar uppliva eitt stórt kursfall á sínum partabrøvum, men enn er talan tó um stóran vinning hjá teimum íleggjarum, sum longu áttu partabrøv, tá føroyska felagið varð noterað á marknaðinum.